FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# SJÚKRARØKTARFRØÐISKÚLI FØROYA BJÓÐAR KLINISKT VEGLEIÐARASKEIÐ OG SKEIÐ Í GERONTOLOGI

## Felags fyri skeiðini

**Málbólkur**
Bæði skeiðini eru á bachelorstøði og øll heilsustarvsfólk við miðallangari framhaldsútbúgving kunnu søkja.

**Tíð**
September 2011 til mai 2012. Hvørt skeiðið fevnir um í alt 7 vikur. Gerontologiskeiðið verður vikurnar 39, 43, 44, 47, 06, 10 og 15.
Kliniskt vegleiðaraskeið verður vikurnar 39, 43/44,48/49, 5/6, 9, 16 og 19.

**Skeiðslýsingar**
Skeiðini eru lýst á heimasíðuni hjá Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya www.setur.fo undir Sjúkrarøktarfrøðiskúlin.
Nærri upplýsingar kunnu eisini fáast við at venda sær til Hildur við Høgadalsá, skeiðsleiðara, hildur.hogadalsa@skulin.fo tlf 292256.

**Stig**
9 ECTS

**Próvtøka**
Skeiðið endar við eini skrivligari bólkauppgávu við munnligari framløgu.
Próvdømingin er innanhýsis og verður mett staðið/ikki staðið.

**Kostnaður**
Prísur fyri hvørt skeið er kr.7.000,-. Gjaldast skal áðrenn skeiðið byrjar, og tilmeldingin er bindandi.
Umsókn við váttaðum avriti av prógvi fyri miðallangari framhaldsútbúgving skal sendast Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya, Jónas Broncks gøtu 25, FO-100 Tórshavn í seinasta lagi 15. juni.

## Skeið í gerontologi

**Endamál**
At tann lesandi fær innlit í, metir um, og nýtir nýggjastu vitan til at skilja tær broytingar, sum fara fram tá vit eldast. At lesandi vera før fyri at grundgeva fyri sjúkrarøktartiltøkum til eldri borgarar út frá vísindaligum kanningum.

**Innihald**
- Ymiskar vísindaligar tilgongdir
- Kroppur, heilsa og elli
- Sálarlig heilsa og trivni
- Gerandislív
- Sosialgerontologi
- Tilgongdin er vísindalig og dentur verður lagdur á, at lesandi út frá vísindaligum tilfari arbeiða við spurdómum innan gerontologi.

**Undirvísing**
Undirvísingin verður skipað sum fyrilestrar, kjak, bólkaarbeiði og framløgur.

**Skeiðsleiðari**
Ása Róin

## Kliniskt vegleiðaraskeið

**Endamál**
At tann lesandi mennir sín førleika sum vegleiðari, undirvísari og próvdómari/eftirmetari innan kliniska útbúgvingarpartin.

**Innihald**
- Læruástøði og lærutilgongdir
- Læruumhvørvi
- Læruhættir og vegleiðing
- Eftirmeting og meting
- Verkætlanarfrágreiðing

**Undirvísing**
Undirvísingin verður skipað sum fyrilestrar, kjak, bólkaarbeiði og framløgur.

**Skeiðsleiðari**
Hildur við Høgadalsá

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

## Aðalfundur

Urguleikarafelagið hevur aðalfund í Hoyvíkar kirkju leygardagin 14 mai kl. 11.
Skrá: "vøggusangur"(babysálmasangur), karaokesangur í kirkjunum, val av nevnd, hvussu seta vit nýtt fólk til? Ymiskt.

Møtið fjølment.

**Urguleikarafelagið**

www.sunda.fo

SUNDA KOMMUNA

# Námsfrøðingar til Dagstovnin á Flatinum, Oyrarbakka

**Vit søkja eftir 3 námsfrøðingum til barnagarðin og frítíðarstovuna, at arbeiða ávikavíst 30 og 25 t pr viku, at byrja 8 august 11. Tímatal og nær byrjast kann, kunnu vit eisini tosa um.**

Á stovninum leggja vit dent á viðurkennandi námsfrøði; og arbeiða m.a. við amboðum sum - Stig fyri Stig, fyri at menna barnsins sosialu og kensluligu førleikar – Tras, fyri at eygleiða málmenningina í dagligum samspæli og brúka m.a. náttúruna fyri at menna barnins rørslu og sansaskipan.
- Tú kemur at arbeiða saman við námsfrøðingi og hjálparfólkið
- Er hetta nakað fyri teg, hevði tað glett okkum at frætt frá tær.

Setanarviðurskifti: Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið á lønarstigi 11 – 18.

Um ongin námsfrøðingur søkir, verða hjálparfólk sett tíðaravmarkað.

Meira fæst at vita: um størvini við at tosa við Rosu Prestá leiðara á tlf. 297247 ella Turið Vík varaleiðara á tlf. 297246

Tú ert eisini vælkomin inn á okkara heimasíðu 123hjemmeside.dk/flatinum at lesa meira um okkara ynskir, førleikakrøv v.m.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagið mánadagin 23 mai 11 og sendast til:

Dagstovnurin á Flatinum
Skúlavegur 9
400 Oyrarbakka

ella flatinum@sunda.fo

Sosialurin 341800

